# Kanningarstjórar eftirlýstir

**Neyðugt verður hjá løgtinginum at fara út um landamark eftir kanningarstjórum eina aðru ferð, heldur Finnbogi Ísakson, fyrrverandi løgtingsformaður. Núverandi løgtingsformaður, Edmund Joensen, heldur hinvegin, at tað varð skipanin, ið vann, tá løgtingið tvingaði Jørgen Niclasen frá, og tí verður kanningarstjórin at finna í Føroyum**

LØGTINGSKANNING
*Ingi Rasmussen*

Advokatar siga seg himprast at taka av, um løgtingið heitir á teir um at gera eina kanning fyri seg eina aðru ferð.

Tað var ein av táttunum í málinum um Jørgen Niclasen. Hann noyddist frá, tí ein kanningarstjóri, sum løgtingið setti, kom til ta niðurstøðu, at hann var farin út um sínar heimildir. Men ivi varð sáddur um kanningina hjá kanningarstjóranum, og tað fekk bikarið hjá advokatum at flóta yvir.

Fyrrverandi løgtingsformaður, sum setti Turið Debes Hentze, heldur hetta vera stak óheppið. Í síni føstu klummu í Fregnum rør hann framundir, at tað kann gerast neyðugt at fara uttanlands eftir einum løgfrøðingi, sum tímir og torir.

– Tað er ilt at meta um, hvønn skaða viðgerðin av hesi kanning hevur voldað upp á longri sikt. Eg havi stúrt fyri, at løgfrøðingar fóru at himprast við at átaka sær arbeiðið at gera eina kanning eftir ta mistonkiliggering, sum Turið Debes Hentze hevur verið fyri. Ein mistonkiliggering, sum sigur, at tann, sum verður settur upp á pláss, hevur evsta orðið at siga um, hvat er rangt, og hvat er rætt, sigur Finnbogi Ísakson.

Hann hevur lagt sær í geyma, at tveir løgfrøðingar hava sagt Sosialinum, at teir høvdu aftrað seg við at tikið eina kanningarstjórauppgávu á seg

– Avleiðingin av øllum hesum fær illa verið annað enn, at neyðugt verður hjá løgtingsformanninum at fara út um landamark at finna løgfrøðingar til slík arbeiði. Tí, krevur landsstýrismálanevndin, at ein kanningarstjóri skal setast, so hevur løgtingsformaðurin skyldu til at seta ein, sigur FInnbogi Ísakson.

Ta skylduna røkir Edmund Joensen, løgtingsformaður í løtuni. Hann heldur kortini ikki, at tað er so rívandi galið, sum hansara undanmaður ger tað til.

– Eg haldi netupp, at løgtingið syrgdi fyri, at tað var skipanin, sum vann. Hevði tað verið soleiðis, at kanningin hjá kanningarstjóranum var tileinkisgjørd, so hevði skipanin verið torpederað, so kundi tað verið neyðugt at leita uttanlands næstu ferð. Men Tingið setti tingini upp á pláss, og tí vita kanningarstjórar eina aðru ferð, at teir verða tiknir í álvara, sigur Edmund Joensen.

Sostatt bendir alt á, at eisini næsti kanningarstjórin verður føroyingur. Um løgtingformaðurin finnur hann.

## Danski umboðs maðurin knýttur at tí føroyska

**Fólkatingsins umboðsmaður verður setiumboðsmaður í Føroyum. Tað merkir, at Hans Gammeltoft Hansen tekur yvir, tá Joen H. Andreasen er ógegnigur**

SETIUMBOÐSMAÐUR
*Ingi Rasmussen*

Í teimum førum, har Løgtingsins umboðsmaður kennir seg at vera ógegnigan at taka eina støðu í einum máli, fer danski umboðsmaðurin at traðka til og gera kanningar og úrskurð í Føroyum.

Hesa avtalu hevur formansskapurin hjá løgtinginum tikið stig til.

Føroyar eru eitt lítið samfelag, og tí er skjótt, at ein lítil stovnur sum Løgtingsins umboðsmaður kemur í eina støðu, har ógegni kann koma upp á tal. Við teimum royndum, sum eru gjørdar í ymiskum málum, har løgfrøðilig tvístøða hevur verið, helt formansskapurin tað ikki vera skilagott, at farið var út til føroyskar advokatar at finna ein avloysara.

Fólkatingsins umboðsmaður hevur stóra virðing millum manna, og tí varð fyrispurningur sendur til hansara at vera umboðsmaður í Føroyum eisini, um tað fellur soleiðis, at føroyski umboðsmaðurin kennir seg ógegnigan. Danski umboðsmaðurin hevur játtað, og sostatt verður hann sonevndur setiumboðsmaður í Føroyum.

Skipanin við umboðsmanni, sum er galdandi í londum kring allan heim, er sprottin úr donsku skipanini. Hans Gammeltoft Hansen er umboðsmaður í Danmark.

# Tá útvarpsverturin fekk morgungron

**Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag kennir seg útihýstan úr Útvarpi Føroya, gongur fram av seinasta úrskurðinum hjá Umboðsmanninum. Óli Jacobsen kærdi ein útvarpsmann, sum ikki nevndi Fiskimannablaðið í morgunsendingini. Umboðsmaðurin heldur ikki grundarlag vera fyri pástandinum um sensur, men átalar málburðin**

AVGERÐ
*Ingi Rasmussen*



*Hilmar Jan Hansen og Óli Jacobsen. Tveir bersøgnir menn í hørðum orðadrátti førdu til, at landsins hægsti kærustovnur, Løgtingsins umboðsmaður, fekk úr at gera og at ein lítil og ósekur táttur í morgunsendingini hjá ÚF var tikin av skránni.*

Tann morgunfríski útvarpslurtarin hevur kanska lagt til merkis, at tátturin at lesa upp úr bløðunum í sendingini »Góðan morgun Føroyar« er tikin burtur.

Talan var um ein stuttan tátt hvønn morgun, har verturin í morgunsendingini las yvirskriftirnar hjá dagbløðunum upp. Orsøkin til, at harmleysi tátturin er tikin av, er ein álvarslig kæra til Løgtingsins umboðsmann frá Óla Jacobsen, formanni í Føroya Fiskimannafelag.

Tað, ið byrjaði sum eitt pinkumál millum útvarpsmannin og Óla Jacobsen, endaði sum ein frágreiðing upp á 31 síður frá umboðsmanninum, har svar omaná aftursvar endaði úti á einum síðuspori, ið til endans snúði seg um, at Óli Jacobsen helt uppá, at Fiskimannafelagið tilvitað varð útihýst frá Útvarpi Føroya.

Til endans troyttaðist útvarpsstjórin so mikið nógv av málinum, at hann tók táttin av skránni.

### Frábað sær grenj

Alt byrjaði um morgunin 23. mai 2002, tá útvarpsmaðurin Hilmar Jan Hansen las upp úr bløðunum sum vant. Hann hevur eftir øllum at døma ikki fingið FF-blaðið í hendurnar hendan morgunin, og tí lesur hann ikki upp úr tí eins og úr hinum bløðunum.

Tað fær Óla Jacobsen at senda eitt hvassorðað faks til tíðindamannin, har hann skrivar: »Hetta finni eg meg ikki í. Tí krevji eg, at FF-blaðið fær somu umrøðu sum hini bløðini við fyrstkomandi høvi, t.v.s. uppundir tíðindasendingina kl. 9.«

Útvarpsverturin gerst skakkur, tá hann fær stungið faksið í hendurnar. Hann fer í sinnisstøðu til telduna og sendir Óla Jacobsen eitt persónligt skriv, har hann greiður frá, at hann samvitskufult plagar at taka bæði FF-blaðið og Trúboðan við í sendingina, hóast hann ikki metir tey at koma undir tíðindabløð. Men hendan morgunin var blaðið ikki komið honum í hendi.

Síðan leggur hann hvassliga afturat: »Og nú, tá eg kortini sendi tær hesar reglur, vil eg gjarna frábiða mær meira grenj um hetta. Hvørja ferð eg eri vertur, royni eg samvitskufult at fáa fatur á øllum teimum útkomnu bløðunum – stórum sum smáum – fyri ikki at nakar skal vera fyri mismuni. Hetta telefaksið hjá tær stinkar langan veg av innbillaðari forfylging, sum eg einki kenni til og ei heldur brýggi meg um at hoyra um.«

Fyri hetta svar fær útvarpsmaðurin seinni eina átalu frá stjóranum, Jógvan Jespersen.

### Fær átalu

Svarskrivið er ovboðið fyri Óla Jacobsen, sum eisini áður hevur kært Útvarpið fyri landsins hægsta kærustovn: Løgtingsins umboðsmannin. Óli Jacobsen kærir hesaferð fyri, at Útvarpið ikki nevndi FF-blaðið í umrøddu sending, og at útvarpsmaðurin svaraði ófólkaliga aftur. Hann førir eisini fram, at Fiskimannafelagið hevur verið útihýst ella í øllum førum fyri mismuni, tá tað ræður um at koma til orðanna í Útvarpi Føroya.

Eitt langt brævaskifti fylgir síðan í málinum, har pástandir verða lagdir oman á pástandir, og svar fylgir svari.

Til endans skerir Joen H. Andreasen, umboðsmaður, ígjøgnum og finst at brævinum hjá útvarpsmanninum. Hann staðfestir, at orðalagið í aftursvarinum til Óla Jacobsen »als ikki og undir ongum umstøðum kundi góðtakast, og tók hann tí undir við, at starvsfólkið hevði fingið eina átalu fyri hetta«. Aðrar avleiðingar fær málið ikki, tí útvarpsmaðurin er farin úr føstum starvi á ÚF.

Umboðsmaðurin helt hinvegin onki grundarlag vera fyri sjónarmiðinum, at Fiskimannafelagið skal hava verið útihýst í Útvarpi Føroya. Tað skjalatilfar, sum liggur í málinum, vísir tvørturímóti, at Fiskimannafelagið javnan verður nevnt í tíðindasendingunum.

### Onki tíðindablað

Í sínari grundgeving fyri, at FF-blaðið ikki altíð varð nevnt, segði Útvarpið, at talan var ikki um eitt tíðindablað. Hesum er Umboðsmaðurin ikki samdur í, og tí eigur FF-blaðið at verða nevnt á jøvnum føti við hini bløðini.

Hvussu er og ikki. Úrslitið av hesum at síggja til lítla máli er, at nú verður onki blað lisið upp í morgunsendingini longur.



# Hugnaløta á Ellisheiminum í Vágum

**Vága Pensionistafelag skipar fyri hugnaløtu á Ellisheiminum í Miðvági sunnukvøldið. Fyrilestur og sangur verða á skránni**

ELDRAVIRKSEMI
*Edvard Joensen*



*– Tað eru ov nógvir pensionistar í Vágum, sum ikki eru limir í Vága Pensionistafelag, heldur formaðurin í felagnum, Frits Jacobsen*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Vága Pensionistafelag skipar sunnukvøldið klokkan 18.00 fyri hugnakvøldi á Ellisheiminum í Miðvági.

– Vit fara at savna pensionistar úr oynni á Ellisheiminum, sigur Frits Jacobsen, formaður í Vága Pensionistafelag. Har verður fyrilestur og okkurt til undirhald.

Heini F. Petersen í Sandavági fer at halda fyrilestur fyri pensionistunum um samferðslu og søguna um flutningin um Vestmannasund. Eisini verður sangur og annað til undirhalds, sigur formaðurin.

Hann sigur, at tað eru 430 pensionistar í Vágum, men Vága Pensionistafelag hevur bara umleið 120 limir. Tað heldur formaðurin vera í minna lagi, og kundi ynskt, at fleiri gjørdust limir í felagnum.

Vága Pensionistafelag er annars virkið á fleiri økjum. Arbeitt verður bæði við dagtilhaldi fyri pensionistar og við at útrvega eldrabýli í oynni, sigur Frits Jacobsen. Hesi tiltøk eru saman við Felagskommununi í Vágum, sigur hann.

Dagtilhaldið hevur verið roynt á Ellisheiminum nú eina tíð, og tað hevur riggað væl, sigur hann. Arbeitt verður nú við at fáa fígging til framhald av hesum tiltaki.

Eisini er Vága Pensionistafelag við í einum arbeiðsbólki, har millum onnur eisini fólk frá Ellisheiminum og Felagskommununi í Vágum eru við, sum arbeiðir við at fáa bygdar eldra íbúðir í Vágum. Frits Jacobsen er við í arbeiðsbólkinum umboðandi Vága Pensionistafelag.

Av øðrum størri tiltøkum, Vága Pensionistafelag hevur fyri í løtuni, er fyrireiking til stóra árliga Eldradagin. Hann verður í ár hildin fyrrapartin í august. Vága Pensionistafelag er hesaferð vertur, og har koma pensionistar úr øllum landinum á stevnu.

Fuglafjarðar Sjónleikarafelag:

# Fyrstu ferð í Mentanarhúsinum

**Í kvøld frumframførir Fuglafjarðar Sjónleikarafelag leikin "Fiskar á turrum landi". Hetta er fyrsta ferðin sjónleikarafelagið framførir í nýggja Mentanarhúsinum**

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

"Fiskar á turrum landi" er heitið á sjónleikinum, sum Fuglafjarðar Sjónleikarafelag í kvøld frumframsýnir. Hetta er ein leikur eftir Árna Ibsen. Turið Sigurðardóttir hevur týtt leikin úr íslendskum til føroyskt.

Sjónleikurin "Fiskar á turrum landi" gongur fyri seg í eini lítlari bygd í Íslandi. Talan er um eina eldri konu, sum hevur ein ungan mann búgvandi, sum hon hevur tikið í fostur. Tvey ung úr Reykjavík koma at gista hjá konuni, og so fara hormonini í gongd.

Høvundurin, Árni Ibsen, sum er íslendingur, hevur skrivað yrkingasøvn, filmshandrit, tilfar til útvarp og sjónvarp, stuttfilmar, sjónleikir og nógv annað. Hann hevur eisini fingist nógv við at týða leikir.

Fuglafjarðar Sjónleikarafelag hevur nú valt at framseta leikin við fleiri ungum leikarum. Leikararnir eru Knútur - Kenneth Jørgensen, Emma - Marita Øre, Gudmundur - Áslakkur Nesá og Gudbjørg - Hanna Lassaberg. Magni Poulsen hevur leikstjórnað.

Sum nevnt verður sjónleikurin frumframførdur í kvøld, leygarkvøld, og heldur áfram helst til mikudagin.







Síðan tá hava ímóti 500 børn og ung umboðað okkum í altjóða tiltøkum kring heimin. Í hesum felagsskapi hava børn og ung møguleikan at uppliva nakað heilt øðrvísi – skapa vinarbond og læra um fólk og mentanir í øðrum londum.

Ert tú 11 ár, og hevur hug og torir at fara heimanífrá í 4 vikur, hevur tú møguleika at sleppa á legu í summar. Føroysk børn fara at luttaka á legum í Brasilia, Kanada, Finland, Frankaríki, Noreg. Tvær gentur og tveir dreingir og ein leiðari eru í hvørjum bólki.

Ungleiðarir - JC, ið skulu vera 16 - 17 ár, fara á legur í Noreg og USA.

Legur fyri 13-14 ára gomul verða í Føroyum, Eystlandi og Íslandi. Á legunum hava fýra ung og ein leiðari úr Føroyum, saman við 6 øðrum londum, høvi at luttaka.

Seminar legur eru fyri 17–19 ára gomul og kunnu føroysk ung luttaka á legum í Eysturíki og Svøríki.

Interchange við Italia. Ein bólkur við 10 ungum í aldrinum 12–13 ár úr hvørjum landi eru saman 1 mánaða. Ein 1/2 mánað í hvørjum landi bæði heima hjá hvørjum øðrum og á legum.

Íslandsferð á páskum í 10 dagar fyri ung í aldrinum 12 – 14 ár.

Leiðarar
Eisini verður søkt eftir leiðarum. Hevur tú hug og dirvi at fáast við børn, ert í minsta lagi 21 ár og vil sleppa út í stóru verð, er hetta eitt gott høvi at royna seg í altjóða høpi. Foreldrini gjalda útreiðslur og ferðakostnaðin hjá leiðarunum.
Til tykkum, ið hava hug at verða leiðarir, fáa nærri at vita við at venda sær til Malu Dam á telefon 31 18 95.

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg, fært tú umsóknarblað, um tú sendur eitt kort við navni og bústaði tít.

CISV - Altjóða Barnalegur, Undir Borgarhálsi, 176 Velbastað. Freistin at søkja er 27. januar.